# Fremad Føroyar

**Fýra føroyingar halda til í danska felagnum Fremad Amager. Tríggir eru sáttmálabundnir og kunnu rokna við spælitíð á besta liðnum**

Eyðun Klakstein
*eydun@sosialurin.fo*



*Føroysku spælararnir taka ein dyst saman við venjaranum hjá Fremad Amager*

*Mynd: Jonhard Hammer*

**Amager:** Fremad Amager er ikki nakað stórt felag í donskum samanhangi, men ítróttarliga avbjóðingin fyri føroyskar spælarar kann tykjast stór.

Næstbesta deildin í Danmark er meira kropsliga krevjandi enn føroyska 1. deild, og fyri landsliðsspælarar, sum miðja eftir at koma uttanlands at spæla, er kjansur í einum donskum 1. deildarfelag ein spennandi avbjóðing, sum eisini kann nýtast sum lopfjøl.

Fremad Amager er eitt siðbundið felag, men ítróttarliga hava tey á Amager ikki havt so nógv at reypa av seinastu árini. Liðið hevur rótast í lægru deildunum og liggur nú í skeiva enda í næstbestu deildini.

Í felagshúsunum á Amager er tilveran heldur ikki gylt. Umstøðurnar í klubbhúsinum eru í lagi, men har er einki, sum hevði gjørt umstøðunum hjá nógvum av føroyskum feløgunum til skammar.

## Føroysk klika

Í Fremad Amager eru fýra føroyskir spælarar. Tríggir teirra hava gjørt sáttmála við Fremad, og teir hava spælt nógv við í fyrireikingunum til seinnu hálvu av landskappingini, sum nú er byrjað.

Jann Ingi Petersen, sum í fjør var rættiligt stjørnuskot í føroyskum fótbólti, tá ið hann gjørdist stuðulsspælari hjá B68 og spældi seg inn í landsliðshitan, gjørdi fyrst sáttmála við Fremad Amager.

Síðani vórðu toppskjúttarnir hjá ávíkavist KÍ og HB eisini boðsendir at koma til danska felagið, og Hjalgrím Elttør og Andrew av Fløtum tóku báðir av.

Harafturat hevur John Heri Dam, sum í fjør spældi við B68, eisini vant í Fremad Amager, men hann hevur ikki fingið stórvegis spælitíð á besta liðnum enn.

## Spælt nógv

Venjarin hjá Fremad Amager helt, at føroysku spælararnir vóru ikki eins væl fyri kropsliga, sum teir donsku spælararnir í felagnum vóru, tá ið fyrireikingarnar til seinnu hálvu byrjaðu.

Hann heldur, at føroyskir spælarar hava ov langan vetrarstegð, og at tað gongur út yvir formin.

Men venjarin hevur so gjørt sítt til fyri at fáa sínar føroyskar spælarar í góðan form, tí hann hevur brúkt teir nógv í teimum mongu venjingardystunum, sum hava verið spældir undan kappingarbyrjan síðst í mars.

Jann Ingi Petersen verður brúktur á sentrala miðvøllinum, meðan Hjalgrím Elttør og Andrew av Fløtum hava spælt í álopinum. Teir hava fingið okkurt hendinga mál, men ikki so nógv, sum teir kanska høvdu vónað, ella sum teir plagdu at gera í Føroyum.

John Heri Dam hevur verið við í einum av venjingardystunum hjá 1. liði, men annars hevur hann spælt á næstbesta liðnum.

Komandi vikurnar sleppa Andrew, Jan Ingi og Hjalgrím so at royna kreftir við næstbestu donsku deildina, og málið hjá Fremad Amager er at sleppa leyst av botninum í 1. deild.

# Á leitan eftir samleikanum

**Í Vejle gerast Christian Høgni Jacobsen og Ian Højgaard partur av kanska fremsta danska fótbóltsskúlanum, sum millum annað hevur framleitt nøvn sum Allan Simonsen og Thomas Gravesen**

Jákup Mørk
*jakup@sosialurin.fo*

Vejle er ikki longur tað, sum tað einaferð var í donskum fótbólti. Fíggarliga megnaði stolta felagið ikki at fylgja við, tá danskur fótbóltur av álvara eksploderaði seinast í 80'unum, og eftir at felagið fleiri ferðir hevur verið á eggini, verður í dag roynt at finna aftur til røturnar.

Og røturnar í Vejle eru eisini heilt serligar. Við einum fótbóltsskúla, sum altíð leggur dent á vakran, tekniskan fótbólt – og hvørs fremsta framleiðsla framvegis eitur Allan Simonsen – verður framvegis roynt at skapa egnar leikarar, sum í framtíðini kunnu teljast millum teir fremstu í ríkinum.

Og millum teir, sum í dag manna besta liðið, eru tveir føroyingar. Nevnliga runavíkingarnir Christian Høgni Jacobsen, sum eisini var við, tá Vejle seinast royndi seg í superliguni, og Ian Højgaard, sum um unglingaaldurin var partur av liðnum, sum tá hevði Allan Simonsen til venjara.

Í dag er tó langt til oddin hjá felagnum. Kappingarári hjá Vejle hevur fyri tað mesta gingið fyri seg í niðaru hálvu, men roknað verður tó við, at liðið við Jens Tang Olesen sum venjara aftur kann finna til røturnar, soleiðis at bæði spæl og úrslit verða tey røttu.

Og tað er eisini neyðugt, um hugt verður at talvuni. Tað eru nevnliga bara fá stig, sum skilja Vejle frá liðunum undir strikuni, og tí verður kanska fyrst og fremst neyðugt hjá Christian Høgna Jacobsen at vísa máltevið, eins og Ian Højgaard skal vísa evnini, sum fyri 10 árum síðani imponeraðu Allan Simonsen somikið nógv, at NSÍ'arin varð roknaður millum teirra, sum kanska áttu eina framtíð í tá sterka leikarahópinum.

# Enn ein føroyingur móti superliguni

**Við Johan Byrial Hansen sum partur av stinnu verjuni tykist AC Horsens hava sett beina kós móti danska fótbóltsoddinum**

Jákup Mørk
*jakup@sosialurin.fo*

Kappingin um at sleppa upp í donsku superliguna er beinhørð. Ikki løgið, tá hugsað verður um munin, sum tað gevur í inntøkum, um tú ert komin har upp. Tó at talan ikki er um ensk tøl í so máta, so er talan um hampuliga nógvar milliónir, sum Viasat rásirnar lata fyri rættindini til superliguna ikki smápengar. Og fyri feløg við stórum vónum er tí neyðugt at fáa part av hesum, um fíggjarligu og ítróttarligu vánirnar skulu sampakka.

Undan hesum kappingarárinum vóru tað tí ikki minst niðurfluttu Silkeborg og Køge, sum nógv varð roknað av, men fyrra kappingarhálva vísti, at tað var eitt lið, sum tað heila snúi seg um.

Við fyrrverandi donsku verjukempuni, Kent Nielsen, við stýrisvølin, tók AC Horsens alt og øll á bóli. Grundað á sera trygt verjuspæl, leikti felagið 14 dystir, áðrenn fyrsta tapið varð veruleiki, og partur av tryggu verjuni var Johan Byrial Hansen. Hálvi føroyingurin, sum eftir eina roynd við superligufótbólti í OB nú er at finna í Horsens.

Enn er ein drúgv hálva eftir av donsku kappingini, men við evstamark hjá hesum blaðnum vóru framvegis níggju stig niður til uppflytingarstrikuna hjá Horsens, og tí er ikki óhugsandi, at Byrial í heyst verður triði føroyingurin í superliguni. Og í mun til tíðina í OB, so kann hálvi føroyingurin her rokna við væl meira av spælitíð, enn tað gjørdist til við OB, har tað oftani var langt millum løturnar í hópinum.










